# Skálafjarðartunnilin lig

**Skulu vit taka valfundin í Runavík í gjárkvøldið fyri góða "vøru", er alt, sum bendir á, at málið um nýggja sambandið millum Eysturoy og Streymoy verður eitt tað fremsta hjá øllum flokkum eftir løgtingsvalið komandi. Øll umboðini søgdu seg taka fult undir við hesi ætlan, og flestu lótu veljararnar vita, at hetta mál kemur at hava fyrsta prioritet eftir løgtingsvalið komandi**

VALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið var almennur politiskur fundur í Ítróttarhøllini í Runavík. Tað vóru Tjóðveldi og Miðflokkurin, sum tóku stig til fundin. Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, beyð vælkomin, og tað var Bill Justinussen, sum takkaði fyri. Annars var væl møtti fundurin ikki merktur av, at tað vóru ávísir flokkar, sum vóru stigtakarar.

Tórbjørn vísti á, at soleiðis, sum valstríðið verður skipað í dag, eru fáir fundir av slíkum slagi longur, og tí høvdu flokkarnir tikið hetta stigið.

Evnið á valfundinum í gjárkvøldið var "Skálafjarðartunnilin – fyrimunir og vansar", og løgtingsmaður Tjóðveldisins helt fyri, at henda stóra verkætlan ikki hevur verið so nógv frammi í seinastuni.

- Vit hava nú gjørt av at varpa ljós á Skálafjarðartunnilin, segði hann.

Valfundurin varð skipaður á tann hátt, at tveir fyrilestrar fyrst vórðu hildnir.

Dávur Reinert Hansen, tekniskur stjóri í P/F Skálafjarðartunlinum, greiddi fyrst frá verkætlanini við orðum og myndum og gjørdi status í málinum, og síðan helt Gilli Trónd, býarfrøðingur og geografur, fyrilestur um fyrimunir og vansar við tunlinum.

Eftir fyrilestrarnar var pallborðsorðaskifti við umboðum úr øllum flokkum. Við pallborðið sótu soleiðis Bjarni Djurholm (Fólkaflokkurin), Heðin Mortensen (Javnaðarflokkurin), Kári P. Højgaard (Sjálvstýrisflokkurin), Alfred Olsen (Sambandsflokkurin), Bill Justinussen (Miðflokkurin) og Torbjørn Jacobsen (Tjóðveldi).

Skipað varð fyri einum spurnarpaneli við Regini Jacobsen, stjóra á Bakkafrost og Meinhardi Jacobsen, stjóra á Faroe Seafood.

Orðstýrari var Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún.

### Lítið umrøtt

Tað var í februar mánaða í 2006, at partafelagið Skálafjarðartunnilin varð stovnað. Kaupthing og Lív stovnaðu felagið, og beinanvegin varð farið undir at fyrireika eina umsókn til Føroya landsstýri. Endamálið við umsóknini var at fáa loyvi til at byggja, eiga og reka eitt fast samband millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy.

Felagið læt landsstýrinum umsóknina 18. januar í 2007, og 30. apríl samtykti løgtingið eitt uppskot til samtyktar frá Vinnumálaráðnum. Við hesi samtyktini kundi landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, nú fara undir samráðingar við P/F Skálafjarðartunnilin um verkætlanina.

Í seinastuni hevur málið verið lítið umrøtt, og landsstýrismaðurin hevur sagt, at hann bíðar eftir eini eykajáttan til keyp av serfrøðihjálp úr útlandinum, tí hann metir ikki, at landsstýrið hevur neyðuga førleikan her heima. Henda játtan kom ikki upp á pláss, áðrenn løgmaður útskrivaði val, og málið fall burtur saman við øðrum málum.

### Allir positivir

Í blaðnum í morgin fara vit at endurgeva partar av tí, sum ávikavist Dávur Reinert Hansen og Gilli Trónd førdu fram. Báðir fyrilestrarnir vóru áhugaverdir – á hvør sín hátt, og kanska serliga heftu fólk seg við ymiskt av tí, sum Gilli førdi fram um, hvat tað kostar at bíða við hesi verkætlan.

Ein partur av framløguni hjá Dáva hevur náttúrliga verið frammi áður – og er kend millum manna, tí málið um undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym hevur eina tíð á baki.

Hinvegin var áhugavert at hoyra Dáva umrøða status, nú felagið hevur bíðað í einar 10 mánaðir eftir politiska myndugleikanum.

Skulu vit taka fundin fyri góða "vøru", nú hetta var ein valfundur, er alt, sum bendir á, at málið um nýggja sambandið millum Eysturoy og Streymoy verður eitt tað fremsta hjá øllum flokkum eftir løgtingsvalið komandi.

Øll umboðini søgdu seg taka undir við hesi ætlan, og flestu lótu veljararnar vita, at hetta mál kemur at hava fyrsta prioritet eftir løgtingsvalið.

Summi valevni tengdu eisini ein altjóða flogvøll uppí hetta málið – ella sum eitt mál, ið liggur næst Skálafjarðartunlinum at loysa.

### Gerast ordiligt

Við pallborðið reistu fleiri spurningin, hví tað hevur tikið so langa tíð hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, at fáa neyðugu játtanina til serfrøðihjálpina úr útlandinum.

Landsstýrismaðurin greiddi frá, at málið ikki er so einfalt, sum nógv vilja gera tað til, tí talan er um at samráðast við eitt ávíst felag um størstu verkætlan í Føroya søgu.

Í fyrsta lagi er neyðugt, at tann peningur, sum verður játtaður til serfrøðihjálpina, kemur upp á pláss, so eingin – ei heldur landsgrannskoðarin – kann seta fingurin á hetta. Í øðrum lagi skal sáttmálin, sum landsstýrið væntandi fer at gera við P/F Skálafjarðartunnilin, leggjast fyri løgtingið, sum eigur endaligu avgerðina.

Vit fara í blaðnum í morgin at vísa meira ítøkiliga á fleiri sjónarmið, sum valevnini førdu fram, men verður tað Bjarni Djurholm, sum verður tungan á vágskálini eftir komandi løgtingsval, hoyrdi øll fundarfjøldin mannin siga, at hann brennur fyri hesi stóru verkætlan, sum Skálafjarðartunnilin er.

- Eftir at nýggj samgonga er skipað, vænti eg, at tað fer at taka einar tríggjar mánaðir at semjast við felagið um ein sáttmála, og síðan kann málið leggjast fyri løgtingið til endaliga støðutakan, segði landsstýrismaðurin, sum av mongum verður lagdur undir at hava ligið oman á hesum máli.

### Mong høgg

Við pallborðið fekk Bjarni



*Teir hildu fyrilestrar á valfundinum í Ítróttarhøllini í Runavík í gjárkvøldið, Gilli Trónd og Dávur Reinert Hansen. Báðir fyrilestrarnir vóru áhugaverdir, og vit fara at venda aftur til teirra í blaðnum í morgin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*